gult20 cyan20 magenta20 svart20

Danska sendirøðin, Matador, fekk eisini føroyingar at seta seg í djúpa stólin. Laura, Mads Skjern, Røde og hini hugtóku, har tey tóku hyggjaran eini 50 ár aftur í tíðina. Fá munnu hugsað um, hvar teir gomlu bilarnir, tey koyrdu í, eru í dag. Teir standa hjá Børge Kå, ein einari, ið býr á Norður Sælandi, og sum sjálvur kallar seg psyko-mystikara, har hann situr millum gamalt jarn, bilar, ovurstórar kaffikannur, súkklur og mangt annað, ið mong óivað vilja vera við er burturkast

Børge eigur Matadorbilarnar

Dagfinn Olsen

Eins og í Danmark, so lógu gøturnar í Føroyum nærum manntómar, tá danska sendiroðin Matador kom á sjónvarpsrútin.

Danski filmstjórin, Erik Balling, stóð aftan fyri sjónvarpsrøðina, ið Lise Nørgaard átti hugskotið til og skrivaði handritið til.

Snúði seg um Danmark fyri eini 50 árum síðani, ella meira – frá 1929 til 1947. Danmark undir týskum valdi, og tíðina um tað mundið.

Men fá munnu í dag hugsa um, hvar bilarnir, ellisakførini, ið nýtt vóru í røðini, eru.

Tað er Børge Kå, ið eigur bilarnar. Børge Kå er í Danmark kendur sum ein einari. Og tað er hann óivað eisini. Hann trívist, har hann er, og sjálvur kallar seg psyko-mystikara, har hann situr millum gamalt jarn, bilar, ovurstórar kaffikannur, súkklur og mangt annað, ið mong óivað vilja vera við er burturkast

Stokt egg á tekjuni

Børge Kå er ein einari. Hann leggur ikki í, hvat onnur halda. Hann hevur tað fínt, har hann er. Er ein til eitt stað, nevnt Udsholt. Á donskum tungumáli lættliga misskilt við udsolgt, ið kann hava skemtiligar miskiljingar við sær.

Í Udsholt húsast Børge. Nærkast ein húsum hansara, so er tað fyrsta ein sær, eitt ovurstórt stokt egg á húsatekjuni. Kemur ein nærri, so eru ovurstórar te- og kaffikannur í túninum. Ymiskir aðrir lutir eru eisini í havanum, ið ikki hevur rúm fyri so nógum grønum plantum. Har er hin ovurstóra boðsúkklan, stólurin, fótbólturin og vatnkannan, sum ein kann sita á "tekjuni" á og njóta eitthvørt gott í góðveðrinum.

Henda dag vit vitja, er Børge ikki inni, men er í danska høvuðsstaðnum og leggur leiðina norðureftir, so kemur ein at enda veg heim. Hava játtað at hjálpa einum felags vinmanni við onkrum her hjá Børga.

Børge kemur tó seinni, og ikki gongur long tíð, so sita vit úti á sokallaðu altanuni og njóta góðveðrið og fáa eitt prát. Børge hevur tveir synir, hava vit frætt. Fyri at teir skulu vera millum tey, ið hava stytst nøvn í ríkinum, so hava teir stutt nøvn (Ib og Bo, ella okkurt sovorðið). Setur ein hetta við eftirnavninum Kå, so er hetta skjótt at skriva.

Børge livir av at leiga sínar ovurstóru kannur, súkklur og annað út til ymisk lýsingartiltøk. Serliga minnist hann súkkluna og eina skemtisøgu.

Á sera høgu boðsúkkluni stendur: Højrøvet bydreng med lange ben søges. Sigast skal, at hjólhesturin er um 4 ella 5 metur høgur.

Matador til nýgift

Tað, ið Børge tó fæst mest við, umframt at putla við líkt og ólíkt, er at koyra nýgift pør í ellisakfari.

Børge eigur nevniliga fleiri ellisakfør. Og millum teirra eru bilar, ið vórðu nýttir í sjónvarpsrøðini Matador.

Men nú standa hesir bilar so fínir hjá Børge. Fíni bilurin hjá Skjern, ella var tað Varnæs, stendur so spelkin við einum skilti á afturendanum, har tað stendur »Nygift«.

Bilurin, sum Susse Vold koyrdi í, er eisini at finna. Hon leikti elskarinna og nútímans dáma og koyrdi í opnum bili.

Jú, her eru teir, matadorbilarnir. Og ikki sørt, at ein kennir seg væl, tá ein setir seg inn í teir. Hetta eru ellisakfør av rætta slagnum!

Vendir alt á høvdið

– Eg er psykomystikari, sigur Børge, meðan vit sita á altanuni, um ein veruleikanum er inngongdin til loftið, har hann heldur til.

– Eg leggi ikki í, hvat onnur takast við. Eg geri tað, eg vil, uttan mun til, hvat onnur siga. Haldi eg meg kunna fáa okkurt nýtiligt ella skemtiligt burturúr onkrum, ja so taki eg tað fegin, um onnur so halda hetta verða nyttuleyst, sigur Børge, ið ger sum honum lystir.

Og skal rætt verða rætt, so er óivað mangt í garðium hjá Børga, ið mong onnur ikki høvdu valt at kalla annað enn burturkast.

Í dag ber til hjá nýgiftum at koyra í stjórabilinum úr sendiroðini Matador

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Sjónleikakvinnan Susse Vold koyrdi í opnum bili í sendiroðini Matador

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Kendi stjórabilurin, Matadorbilurin

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Børge Kå, einari og psykomystikari, legði seg á knæ, so kannurnar tóktust størri á myndini. Tær eru nú ivaleysa stórar frammanundan

(Mynd: Dagfinn Olsen)

gult21 cyan21 magenta21 svart21

Bukka undir loftinum

Men at trína innar í garðin hjá Børga, har stóra høllin eisini stendur, er sum at koma í aðra verð. Høllin var einaferð dansistova, forsamlingshús, har tey ungu royndu so mangt á fyrsta sinni. Í dag er hetta eisini ein verð, har alt verður vent á høvdið.

Tað, ein undrast mest á, eftir at hava sæð flotta Ford T bilin er, at ein bukka hongur undir loftinum. Hyggur ein nærri, so sæst, at har er so mangt annað. Framman fyri bukkuna er eitt par av skóm. Eitt sindur frá eitt vældekkað borð. Ein fullkomin verð hongur undir loftinum, so ein nærum fer at ivast í, um ein sjálvur vendir rætt.

Kanska hava ikki so mong hugsað aftur um bilarnar, men heldur um sjónleikararnar í Matador, sum jú ikki allir eru á foldum longur. Men ellisakførini eru. Her, í øðrum heimi, standa teir, bilarnir frá Matador, sum hugtóku okkum, saman við sjónleikarunum.

Í dag koyra nýgift í bilunum, sum vit hildu vera bilin hjá bankastjóranum í Korsbæk. Hann líkasum hoyrdi honum til. Millum framtíðaræltlanirnar hjá Børge er at umbyggja nýkeypta líkvognin um til ein av hesum hestavognunum til ferðafólk, sum vit kenna frá covboyfilmum. Hvussu hetta skal gerast, hevur Børge eina greiða mynd av, tó bert í huganum, men at tað ber til, ivast hann ikki í. Hann hevur so managn prógvað, at tað ógjørliga ber til.

Vit vilja hava eina mynd av Børge, og tað er eisini skjótt, at tað er avgreitt. Børge setur skógvarnar frá sær og leggur seg á knæ á teir. So hann líkist einum dvørgi. Soleiðis síggja kannurnar størri út, heldur hann, meðan myndatakarin hugsar, at kannurnar eru ovurstórar, hóast hetta.

Skuldi tað hent, at lesarin sær eina lýsing, har eitthvørt ovurstórt kemur fyri, so er als ikki óhugsandi, at Børge Kå hevur ein fingur við í spælinum…

Tann øvugta verð. Ein heimur fyri seg límaður undir loftið

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Hjólhesturin til longu beinini

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Ein vælhildin taxavognur, Ford T

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Matador og Balling

Tað var danski prestasonurin, filmstjórin Erik Balling, ið stoð aftan fyri Matador. Hann er danski filmstjórin við mest viðráki. Hann eigur heiðurin av sera nógvum kendum filmum og sjónvarpsrøðum

Dagfinn Olsen

Sigur tú Olsen-banden, Huset på Christianshavn, Midt om Natten og Matador, so er ein felagsnevnari. Erik Balling.

Erik Balling er danski filmstjórin, ið eigur heiðurin av størstu filmum og sjónvarpsrøðum í danskari filmsøgu. Síðani fimmtiárini hevur hann fingist við at gera film.

Hann hevur fleiri ferðir verið við til at leggja gøturnar manntómar, t. d. við Huset på Christianshavn og Matador.

Olsenbanden, sum Balling gjørdi saman við Henning Bahs, kenna tey flestu. Vinmenninir Balling og Bahs skapaðu saman fleiri ætlanir. Ein teirra Olsenbanden, men Bahs var eisini við á øðrum pletskotum. Í Olsenbanden hugnaðu teir sær við at finna uppá alt møguligt og ómøguligt. Og hetta skuldi helst henda við so fáum og einføldum lutum, sum gjørligt. Hetta varð síðani kókað nirður til legendarisku ætlanina hjá Egon Olsen.

Um Matador skrivar prestasonurin Erik Balling m. a. í endurminningum sínum, ið kallast »Som barn var jeg voldsomt hidsig«, at Matador var ein hættislig ætlan hjá Nordisk Film. Erik Balling visti, at Lise Nørgaard hevði hugskot til okkurt, sum hon gekk og hugsaði um. Hann spurdi, um hetta kanska kundi nýtast sum tilfar til sjónvarpsrøð. Hon játtaði og seinni kom hon við úrslitinum. At byrja við vóru seks partar.

Balling sá tó skjótt, at bert í fyrsta partinum var tilfar til minst seks partar. Hetta, tá farið var í smálutir við søguni um Mads Andersen Skjern, sum setir seg niður í Korsbæk. Lise Nørgaard var við upp á hugskotið og fór í holt við handritið útfrá hesum hugsanum, sum seinni vístu seg at halda.

Nærum øll fíggjarætlanin í hetta árið fór til ætlanina. Veruleikin er eisini, at við bert seks pørtum av Matador, hevði úrsitið verið eitt undirskot hjá Nordisk Film.

Danmark varð koyrt upp og niður, fyri at finna eitt stað, ið kundi nýtast til Korsebæk. Endin var, at semja var um at byggja týðandi partin av Korsebæk, gøtuna, á eitt ónýtt stað aftanvert upptøkuhølini í Valby.

Í bókini greiðir Balling frá, hvussu arbeitt varð við Matador. Frá tíðliga á morgni og allan dag. Sjónleikararnir høvdu jú eisini síni størv á leikhúsunum á kvøldi.men Balling metir, at so áhugavert var at starvast við Matador, at hóast strævið, so møttu øll frísk og væl uppløgd hvønn morgun.

Heldur tronga byrjanin gjørdi, at tað var eitt spent filmslið, ið fylgdi við, tá Matador fór í luftina fyrstu ferð á heysti í 1978.

Og Balling greiðir frá, at gleðin var stór, tá tað var greitt, at tað einaferð enn var eydnast at leggja gøturnar manntómar og halda dønum heima við sjónvørpini.

Kelda: Som barn var jeg voldsomt hidsig, Endurminningar. Erik Balling

Grønland, Ísland og Føroyar

Erik Balling hevur starvast í Grønlandi, Íslandi og Føroyum, her filmurin Tro, Håb og Trolddom kom burturúr. Í endurminningum sínum greiðir Balling m. a. frá samstarvinum við William Heinesen

Dagfinn Olsen

Erik Balling, filmstjóri, starvaðist við filmi í Danmark, men hann var eisini í Grønlandi, Íslandi og Føroyum í somu ørindum. Føroyingar minnast óivað nógvir filmin Tro, Håb og Trolddom, ið varð tikin upp í Føroyum. Nakrir føroyingar vóru við í filminum, sum Balling og William Heinesen gjørdu handrit til.

Filmurin er frá 1960, og eisini her stóð Henning Bahs fyri teimum serstøku kryddaríunum. Millum donsku leikararnar vóru Bodil Ipsen, Gunnar Lauring, Peter Malberg, Poul Reichardt og Louis Miehe-Renard.

Um samstarv sítt við William Heinesen greiðir Erik Balling hugvekjandi frá í endurminningum sínum.

Balling setti seg í samband við »Færøernes store digter«. Balling kendi bøkurnar hjá William, og honum dámdi tær sera væl. Til stóra gleði fyri Balling var William Heinesen við upp á hugskotið um samstarv teirra millum. Balling sigur, at tað, at William segði ja til samstarvið, metir hann sum eitt tað besta, ið er hent honum.

Balling herjaði á, hóast sjóverk, og kom til Havnar og vitjaði William heima við hús. Fyrsta ætlanin var at gera skaldsøgu Williams, Nóatún, til film. At røkka endamálinum reikaðu teir Føroyar á tamb. Og Balling metir, at »jeg havde den fornemmeste rejsefører, man kan forestille sig«.

Balling greiðir frá eini ferð um fjøll, har útsýnið skuldi vera so framúr. Tá teir komu niðná, var bert mjørki at síggja. Men William Heinesen greiddi frá og lýsti alt so væl, at Erik Balling er ivaleysur í, at hann er tann einasti, ið veruliga hevur sæð vakrasta útsýnið, ið er í Føroyum.

Kelda: Som barn var jeg voldsomt hidsig, Endurminningar. Erik Balling